Hoyvík 9-2-2024

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

**Hoyringarsvar viðv. uppskoti til løgtingslóg um broyting av Elveitingarlógini** (Framleiðsla og søla av el og fjarhita).

Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti er felagsskapur, ið fevnir um so at siga allar privatar ikki-vinnuligar brúkarar av fjarhita í Tórshavnar kommunu. Í praksis eru tað eigarafeløgini í økjunum, har fjarhitaveiting er, sum eru limir í Skynsomum Fjarhita.

Ónøgdin við fjarhitaviðurskifti, og undir hesum serliga prísviðurskiftini, røkkur heilt aftur til byrjanina av fjarhitaveitingini umleið 1990. Tá brúkarafelagið varð stovnað í 2019 stóð tað brúkarunum greitt, at ógvusliga íløguvirksemið hjá Fjarhitafelagnum fór at hava við sær eina skuld upp á hundraðtals milliónir, sum brúkararnir skuldu gjalda. Tá, í 2019, var verulig gongd komin á alternativar upphitingarmøguleikar við m.a. berghita og luft-vatn varmapumpum. Hetta eru bíligari upphitingarmøguleikar enn bæði oljuupphiting og fjarhiti, og av tí at fjarhitabrúkararnir eru álagdir at innleggja fjarhita, høvdu brúkararnir ta áskoðan, at prísurin á fjarhita átti at vera kappingarførur við hesar upphitingarformarnar. Tað skuldi vísa seg, at gongdin fór at vera tann øvuta, og prísurin á fjarhita er nú so høgur sum nakrantíð, og útlitini frameftir eru ikki tey bestu.

Royndirnar hjá brúkarafelagnum at fáa eitt orðaskifti í lag við Fjarhitafelagið, fyri á tann hátt at ávirka viðurskiftini rætta vegin, hava ikki ført til nakað. Fjarhitafelagið er sera afturlatið, tá ið tað ræður um at lata upplýsingar frá sær, og skrivligt tilfar fæst so at siga ikki frá felagnum.

Tí tekur brúkarafelagið fult undir við, at vit fáa eitt lógarásett regluverk fyri fjarhitaveiting, soleiðis sum skotið verður upp. Vísandi til trupla samskiftið við Fjarhitafelagið og vantandi viljan hjá felagnum at lata upplýsingar og tilfar frá sær og at samstarva við brúkararnar, sum eru tvingaðir upp í skipanina, eru ásetingarnar um fjarhita í hesum lógaruppskotinum harðliga tiltrongdar, so eisini fjarhitaskipanirnar koma undir eitt skipað eftirlit. Vit hava hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

---

*Yvirskipað:*

Grundleggjandi er tað gleðiligt, at myndugleikarnir endiliga taka á seg leiklutin at geva loyvi til at reka fjarhitaskipanir og hava eftirlit við teimum. Sum nevnt frammanfyri hevur tað í okkara øki so

at siga frá byrjan verið ein ónøgd við fjarhitaviðurskifti, tó ikki hitaskipanina sjálva, tí hon hevur virkað rættiliga væl, men við tann mátan, sum Fjarhitafelagið hevur agerað uppá.

Tað er heilt vist at fegnast um, at fjarhitaskipanir frameftir skulu hava loyvi frá myndugleikunum áðrenn farið verður undir tær, og eisini at tað krevst loyvi til at broyta og víðka fjarhitaskipanir.

Kortini er tað júst her, at brúkarafelagið sær tann størsta vandan í hesum lógaruppskotinum, tí undir hvørjum formi skal verandi skipan hjá Fjarhitafelagnum góðkennast? Skal hon blástemplast øll undir einum, ella skal loyvi gevast til teir einstøku partarnar í skipanini soleiðis, at upprunaskipanin, tað vil siga at skipanin til privatu brúkararnar í Hoyvíkshaganum, sum jú var fyrsti partur av Fjarhitafelagnum, verður góðkendur fyri seg, og at útbyggingarnar, sum síðan eru gjørdar, vera góðkendar hvør sær, í tí raðfylgju tær eru gjørdar, og eftir at myndugleikin hevur eftirkannað tær einstøku ætlanirnar?

Orsøkin til, at brúkarafelagið setur hetta spurnarteknið er, at vit hava ein grundaðan illgruna til at halda, at tær útbyggingar, sum Fjarhitafelagið hevur gjørt út um ta upprunaligu skipanina uppi í Hoyvíkshaganum, ikki hava hingið saman fíggjarliga. Tað hevur eftir okkara tykki havt við sær ein nógv hægri prís til upprunaligu brúkararnar enn neyðugt og rætt er, og tí hevði Fjarhitafelagið ongantíð fingið loyvi til hesar ætlanir, um allar upplýsingar vóru lagdar fram alment – ella fyri ein loyvisgevandi myndugleika.

Verður øll skipanin hjá Fjarhitafelagnum góðkend undir einum, so er ein veruligur vandi fyri, at gamlar – og ólønandi – útbyggingar vera góðkendar afturvirkandi við tí úrsliti, at fjarhitabrúkararnir, sum hvørki hava fingið kunning ella svar upp á fyrispurningar, í alla framtíð skulu rinda ein alt ov høgan prís fyri fjarhitan, og tí er, eftir okkara tykki, neyðugt við einari áseting í lógaruppskotinum, sum greitt sigur, at verandi skipan hjá Fjarhitafelagnum, skal góðkennast í bitum.

Fyri uttanfyristandandi kann tað virka bakvent, at ein skipan, sum hevur virkað í sløk 40 ár, nú skal góðkennast afturvirkandi og í bitum, men hetta er ikki eitt ókent fyribrigdi í føroyskum høpi. Í 2009 fekk SEV boð frá elveitingareftirlitinum um at afturføra slakar 630 milliónir krónur, tí felagsskapurin hevði avskrivað aktiv ov skjótt, og tí finst eitt fordømi um, at myndugleikin afturvirkandi broytir/góðkennir framdar verkætlanir.

*Prísáseting:*

Av tí at bara partur av húsarhaldunum í landinum fáa álagt at brúka fjarhita, og at hesi veruliga høvdu ella hava annan bíligari møguleika, so átti fjarhitin at havt ein málsetning um kappingarføri, sum myndugleikin kundi hildið prísásetingina upp ímóti.

Ein týdningarmikil táttur í, at raksturin av fjarhitanum skal hvíla í sær sjálvum, eigur at vera, at tað ikki verða gjørdar íløgur, sum í sjálvum sær ikki eru lønandi, uttan so at ekstern fígging verður fingin til undirskotsgevandi partin. Ein fylgja av hesum eigur at vera, at fjarhitabrúkarar, sum ikki eru fevndir av ávísari útbygging av fjarhitanum, eiga ikki at merkja útbyggingina á prísinum. Brúkarafelagið hevur varhugan av, at stórur partur ella kanska allar tær stóru íløgurnar, sum eru gjørdar í

Havnini tey seinastu nógvu árini, lúka ikki eitt minstakrav um at vera lønandi í sjálvum sær. Vit eru fullgreið yvir, at vit hava ikki upplýsingar, sum beinleiðis kunnu vátta hetta, men roknskapirnir hjá Fjarhitafelagnum eru týðiligir hesum viðvíkjandi – te. vaksandi skuld, vaksandi framleiðslukostnaður og undirskot (meira um hetta seinni).

Tað hevði tí verið ein vátur vøttur í andlitið á brúkarunum, um nýggja regluverkið tók støði í og góðtók tað, sum farið er fram seinastu árini við stórum útbyggingum. Í staðin eigur komandi myndugleikin at biðja um at fáa viðkomandi útbyggingarætlanir til góðkenningar, soleiðis at støða kann takast til, í hvønn mun fjarhitabrúkararnir eiga at bera kostnaðin av teimum.

*Innlit í fyrisitingina:*

Hóast Fjarhitafelagið púrasta er uttan kapping um kundarnar, so er felagið skipað sum eitt partafelag og verður rikið sum eitt slíkt. Í allarflestu førum vera partafeløg, eisini almenn partafeløg, rikin sum vinnulig feløg á tann hátt, at tað ikki ber til at fáa innlit í virksemi felagsins við støði í lógini um innlit í fyrisitingina.

Tað finst tó eitt undantak. Tá ið Løgtingið í 2014 samtykti lógina um pf. Visit Faroe Islands, varð sett í grein 6, at lógin um innlit í fyrisitingina, Ll. 133/1993, er galdandi fyri felagið. Tað merkir í stuttum, at almenningurin hevur rætt til at biðja partafelagið Visit Faroe Islands um innlit í viðurskifti, sum eru fevnd av lógini.

Av tí, at Fjarhitafelagið virkar undir teimum treytum, sum felagið ger, m.a. at brúkararnir í Hoyvíkshaganum eru tvingaðir upp í felagið og at tað eru ein kommuna og ein interkommunalur felagsskapur, sum eiga partapeningin, so eigur lógin um innlit í fyrisitingina eftir okkara tykki sjálvandi eisini at verða galdandi fyri hetta felagið.

Tað, at lógin um innlit í fyrisitinga ikki er galdandi fyri felagið, ger eftir øllum at døma, at Fjarhitafelagið ikki sær nakra grund til at svara fyrispurningum, eitt nú frá brúkarafelagnum ella frá miðlum, sum hava roynt at venda sær til felagið.

*Roknskaparlig viðurskifti:*

Vantandi møguleikarnir fyri innliti gera eisini, at brúkararnir í Fjarhitafelagnum ongan møguleika hava at eftirkanna tað, sum gongur fyri seg í felagnum, heldur ikki roknskapirnar. Tí mugu vit, sum í so nógvum øðrum viðvíkjandi Fjarhitafelagnum, eisini her gita út frá tí, sum vit síggja í roknskapinum. Verða avskrivingar gjørdar av órøttum, eru tær við til at geva eina skeiva mynd av rakstrinum av felagnum, og vit hava varhugan av, at Fjarhitafelagið framhaldandi hevur avskrivað anlegg, sum í tíðarskeið eru tikin úr rakstri, og at felagið hevur avskrivað anlegg, sum enn ikki eru komin í rakstur.

Hvørki av hesum eiga at koma fyri, men er tað so, sum vit hava illgruna um, ja, so ger tað úrslit felagsins verri, og tað hevur so aftur við sær, at felagið av órøttum kann halda ein hægri prís.

Um vit hyggja eftir rakstrinum av Fjarhitafelagnum frá aldarskiftinum, so síggja vit, at felagið tey fyrstu nógvu árini, faktiskt heilt fram til 2014, hevði ein rímiliga skynsaman rakstur, har framleiðslukostnaðurin, har avskrivingar eisini eru ein partur, sveiggjaði millum 35 og 53 prosent av umsetinginum. Síðan tá er raksturin bara versnaður, og serliga hesi seinastu árini hevur tað verið heilt galið. Lutfallið millum inntøkur og framleiðslukostnað er broytt munandi, og serliga ringt var tað í 2022, tá ið framleiðslukostnaðurin var meira enn 90 prosent av inntøkunum, og árið fyri lá hann um 80 prosent.

Vit hava varhugan av, at útbyggingarnar hjá felagnum geva ikki nær til tær inntøkur, sum ætlað var, og tá hetta eru ógvuliga dýrar íløgur, so bera tær seg heilt einfalt ikki.

Taka vit tíðarskeiðið frá aldarskiftinum fram til endan av 2022, sum er seinasta roknskaparárið, so hevur Fjarhitafelagið gjørt íløgur fyri slakar 300 milliónir. Felagið hevur – burtursæð frá 2022 – ongar pengar fingið frá eigarunum, tað vil siga, at tað bara eru brúkararnir í felagnum, sum hava goldið fyri íløgurnar, umframt tað, sum er fíggjað við láni. Við ársenda í 2022 hevði felagið eina lánbyrðu upp á 90 milliónir krónur, umframt stuttfreistaða skuld til peningastovnar upp á 65 milliónir krónur.

Tað vil siga, at felagið tá hevði eina bankaskuld upp á 155 milliónir krónur, sum skal rentast við einari hækkandi rentu. Siga vit, at rentan t.d. er fýra prosent, so er rentuútreiðslan av hesari upphæddini umleið seks milliónir krónur um árið fyrstu árini, sum er umleið 20 prosent av øllum útreiðslunum.

Tí er tað eftir okkara tykki tvingandi neyðugt, at tað verður felt inn í lógaruppskotið, at myndugleikin afturvirkandi skal kanna, hvussu – ella um – allar útbyggingarnar hjá Fjarhitafelagnum hava hingið saman. Við okkara kunnleika til Fjarhitafelagið hava vit ikki álit á, at hetta verður gjørt, um tað ikki verður sett inn í lógina, og tí mæla vit til, at tað verður sett inn.

*Førleiki hjá nevndarlimum:*

Fjarhitafelagið er í dag skipað soleiðis, at tað eru SEV og Tórshavnar kommuna, sum eiga partapengingin, sum velja nevndarlimirnar, og formansskapurin gongur upp á skift millum eigararnar báðar.

Nevndarsessirnir í Fjarhitafelagnum eru beinleiðis partur av konstitueringini í Tórshavnar kommunu og óbeinleiðis í limakommununum í SEV. Tað vil siga, at tað eru politikarar, sum sita í nevndini, og tað er ikki fakligi førleikin, sum kemur í fyrstu røð. Við hesum er vandi fyri, og tað hava vit eisini varhugan av er førið, at tað er leiðslan, sum er tann stýrandi parturin í Fjarhitafelagnum og ikki politikararnir, sum sita í nevndini.

Hetta er eftir okkara tykki skeivt, og tí eigur tað at vera eitt krav, at nevndarlimirnir skulu hava fakligar førleikar fyri at kunna sita í nevndini í fjarhitafelag, í øllum førum, har brúkararnir eru tvingaðir at vera við.

*Møguleiki at sleppa burturúr:*

Í løtuni er tað so, at brúkararnir í Hoyvíkshaganum eru tvingaðir at vera knýttir at Fjarhitafelagnum. Um tað var so, at skipanin var bíligari – og grønari – enn aðrar loysnir, so var tað til at skilja, men soleiðis er støðan ikki.

Fjarhitafelagið vil fegið hava okkum og onnur at trúgva, at hetta er bæði tann grønasta skipanin og tann bíligasta, men hetta er ikki so. Fjarhitaskipanin er ikki grøn, tað er ein skipan við avlopshita frá brennistøðini og frá elverkinum á Sundi, og tað finnast aðrar grønari skipanir enn fjarhitaskipanin.

Fjarhitaskipanin er heldur ikki tann bíligasta. Fjarhitafelagið sigur vítt og breitt, at skipanin er tann bíligasta, men tað er tí, at felagið byggir sínar útrokningar á gomul tøl um oljufýringar. Um frymilin hjá Fjarhitafelagnum varð dagførdur til nýggjar oljufýringar, vísir roknistykkið, at fjarhitaskipanin er væl dýrari enn oljan.

Tí mæla vit eisini til, at mann setur inn í lógina ein møguleika hjá brúkarum at sleppa burtur úr skipanini, um fjarhitin er dýrari fyri brúkaran enn alternativir upphitingarmøguleikar.

Heilsan

Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti

Brian Rasmussen, nevndarformaður

Jan Mortensen, nevndarlimur

Jóannes Jakobsen, nevndarlimur
(staddur uttanlands)

Oddmar Kruse, nevndarlimur

Lis Mortensen, nevndarlimur

**Brúkarafelagið Skynsamur Fjarhiti umboðar:**

1. Eigarafelagið Millum Gilja (56 húskir við fjarhita)
2. Eigarafelagið Við Myllutjørn (64 húskir við fjarhita)
3. Eigarafelagið Hoyvíkshædd (174 húskir við fjarhita)
4. Eigarafelagið í Maritugøtu (131 húskir við fjarhita)
5. Eigarafelagið Undir Kongavarða (95 húskir við fjarhita)
6. Eystan Kongavarða (32 húskir við fjarhita)
7. Eigarafelagið Oman Gil (24 húskir við fjarhita)
8. Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta (68 húskir við fjarhita)
9. Eigarafelagið Lítlagil (100 húskir við fjarhita)
10. Eigarafelagið Inni á Gøtu (130 húskir við fjarhita)
11. Eigarafelagið Blómubrekka (68 húskir við fjarhita)
12. Eigarafelagið Eystan Gil (92 húskir við fjarhita)
13. Eigarafelagið Berjabrekka 1 (69 húskir við fjarhita)
14. Eigarafelagið Berjabrekka 2 (32 húskir við fjarhita)